# Harley tá hon er best

**Harley Davidson umboðið í Føroyum HD.fo v/Ove Ritter hevur fingið nakrar av teimum nýggjastu súkklunum av 2008 árganginum heim umframt eina Ultra Classic við allari hugsandi útgerð**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hjá Harley Davidson í Føroyum eru nú 2008 modellini á skránni. HD.fo v/Ove Ritter hevur fingið nakrar av teimum nýggjastu súkklunum umframt eina Ultra Classic við allari hugsandi útgerð.

Hesar »Harley Davidson FLHTCUSE Screamin Eagle Ultra Classic Electra Glide« sum rætta navnið á súkkluni er,verða einans gjørd í heilt fáum eindum, men HD.fo hava tó fingið eina slíka heim. Súkklan er framleidd á eini heilt serligari framleiðslulinju, ið nevnist CVO (Custom Vehicle Operations), har hendan súkklan er nummar 193.

Umframt at Ultra classic er tann flottasta og best útgjørda Harley yvirhøvur, hevur hendan hópin av aðrari luksusútgerð afturat. Talan er um eina súkklu, sum kostar um hálva millión her hjá okkum og um 800.000 kr. at keypa í Danmark.

Motorurin er ein 2 syl. 4-takt V-motorur við ESPFI (Electronic Sequential Fuel Injection) innspræning og einum snúningsmomenti upp á 196 Nm við 3.000 snún/min og 135 hk. Hóast súkklan vigar um 400 kg, er hon sera kvik og koyrir frá 0-100 km/t upp á umleið 7 sek.

## Komfortur á høgum støði

Komforturin er á høgum støði og í røttum amerikanskum stíli, hon er t.d. gjørd til at koyra langt við, uttan at tey sum sita í leðursetrunum á súkkluni møðast. Súkklan hevur allar framkomnar trygdarskipanir sum t.d. GPS-navigatiónsskipan, XM Satellite radio, fløguspælara, MP3-spælara, CB radio, internt kommunikatións-anlæg, cruise-control, fjarstýring til garasjuhurðina, perlemor custom lakkering, hita í setrum og handtøkum, og ikki at gloyma hevur hon tað heilt rætta og væl kenda Harley ljóðið.



*Harley Davidson Ultra Classic Electra Glide er tann flottasta og best útgjørda Harley yvirhøvur*

HD.fo hava sum nakrir av teimum fyrstu Harley forhandlarunum í Evropa fingið nakrar av 2008 modellunum heim. Ein av hesum er ein sera væl útgjørd Harley Davidson FXSTBI Dyna Street Bob við 1584 ccm innspræningsmotori og 6 trins girkassa. Seturhæddin er einans 65 cm. Súkklan er løtt at koyra og at umgangast í allar mátar.

Meira fæst at vita á heimasíðuni www.HD.fo ella við at ringja á tel. 210405.



*Motorurin er ein 2 syl. 4-takt V-motorur við ESPFI-innspræning og 135 hk*



*Súkklan hevur allar framkomnar trygdarskipanir sum t.d. GPS-navigatiónsskipan, XM Satellite radio, fløguspælara, og MP3-spælara*



*Ein av 2008 modellunum er hendan væl útgjørda Harley Davidson FXSTBI Dyna Street Bob*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# 500 bilar á Sel.fo



TÍÐINDASKRIV

Enn einaferð hevur Sel.fo eitt met av bilum inni á síðini. Tað var tann 11. september 2007 líka eftir miðnátt, tá ið 500 bilar vóru at síggja í senn inni Sel.fo. Hóast tað tilsamans hava verið fleiri bilar gjøgnum tíðina, so er tað fyrstu ferð teljarin á síðini vísti 500 bilar.

Sel.fo er í dag tann størsta heimasíðan í Føroyum fyri privatar seljar á netinum við 3.598 limum, har umleið seks nýggir limir verða skrásettir um dagin.

*www.sel.fo*